## Unga Tjóðveldið vil hava kanningarstjóra

Unga Tjóðveldið tekur fult undir við uppskotinum hjá Sjálvstýrisflokkinum um at seta kanningarstjóra til tess at koma til botns í skrivstovumálinum, ið tók grundarlagið undan CHE samgonguni. Tað sigur felagið í tíðindaskrivi: - Slíkt kann ikki fara fram í landsins hægsti leiðslu, uttan at stig verða tikin,til tess at finna fram til sannleikan, sigur Unga Tjóðveldi, sum heldur, at um løgtingið ikki tekur neyðugu stigini, so er hetta at beinleiðis vanvirða Føroya fólk.



*Barbara Holm er forkvinna í Unga Tjóðveldið*

# Ferðavinnan fær ongar sømdir



*Ferðavinnan í Føroyum hevur nógvar møguleikar, men uttan fígging verður hon liggjandi í somu grøv. Uffe Bærentsen metir hetta vera sera harmiligt*

**Í Føroyum gagnnýta vit ikki ferðavinnuna, sum vit kundu gjørt, um einans vilji og fígging vóru til tess. Uffe Bærentsen roynir við hesum at upplýsa og kunna, so Føroyar kunnu fáa eina sterka og burðardygga ferðavinnu**

FERÐAVINNA
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Ferðavinnan hevur als ikki fingið sama ans, sum aðrar vinnur seinastu árini. Stuðulin, ið verður veittur til hana, leiðir ongan veg. Meira peningur hevði verið ein íløga, sum í longdini hevði givið meir aftur. Heldur Uffe Bærentsen, sum vil hava ferðavinnuna at leggja seg eftir til eina inntøku fyri Føroyar.

Í løtuni verður nógv fígging skotin inn í til dømis fiskivinnuna, men stuðulin til ferðavinnuna er so soltin, at lítið fæst burturúr. Høvdu 150 milliónir krónur verið lætnar afturat árliga komandi 10 árini, metir Uffe Bærentsen, at vinnan hevði megnað at borið seg sjáva.

Ein vinna sum ferðavinnan ávirkar so at siga allar aðrar vinnur. Ferðafólk koma við sínum egna kapitali og nýta hann í Føroyum.

- Ringvirkningarnir eru so nógv størri enn man gevur sær far um, alt verður ávirkað, sigur hann. Men fyri at fáa fólk hendan vegin, má okkurt gerast. Í verandi løtu koma eins nógv ferðafólk, sum fyri 20 árum síðan. Hotellini í miðstaðarøkinum standa hálvtóm og aðrastaðni stendur enn verri til.

### Fígging neyðug

Fiskivinnan hevur í árunum 1993-2007 fingið stuðul á eina góða milliard krónur, og hendan pening hevur vinnan nýtt væl, serstakliga tá hugt verður eftir, hvussu stóran týdning hon hevur, greiðir Uffe Bærentsen frá. Men peningurin, ið hevur verið veittur til ferðavinnuna er einans góðar tíggju milliónir árliga. Flestu vinnur mugu hava eitt skump fyri at gerast til nakað, og enn manglar ferðavinnan hetta skumpið.

Til samanberingar eru í løtuni eru umleið 10 ferðaskrivstovur – og 180 fiskiskip. Umleið 66 skrásettar matstovur og til samanbering 68 fiskavirkir.

- Tað fer alt ov lítið ígjøgnum maskinurnar í ferðavinnuni, har eingin kvota er á tilfeinginum, sigur Uffe Bærentsen

### Føroyar sum feriustað

Áhugin fyri at vitja Føroyar kundi verið nógv størri, enn hann er í dag. Virda blaðið National Geographic Traveller gav út ein lista við heimsins bestu oyggjasamfeløgum, har Føroyar vóru mettar at vera nummar eitt. Tað ein upplagdur møguleiki at nýta hetta og velja at leggja seg eftir júst teimum ferðafólkunum, ið kunnu hava hendan áhugan.

Í verandi løtu vitja á leið 50.000 fólk, men talið kundi verið fýrfaldað eftir tveimum árum. Tað vil siga at umleið 200.000 ferðafólk vitja millum mars og novembur. Hetta talið kann samanberast við Bláu Lón í Íslandi, ið hevði um 40.000 vitjandi árliga, men eftir útbyggingina tíggjufaldaðist talið. Bornholm fær vitjan av 13 ferðum fleiri fólk um enn fólk búgva har. Og í Venezia, har 300.000 fólk búgva, koma umleið 12 milliónir ferðandi. Útfrá hesum tølum má metast, at Føroyar væl og virðiliga tola 200.000 ferðandi um árið.

### Burðardygg framtíð

Hóast hálvonnur milliard uppá tíggju ár ljóðar av nógvum, er hetta ein íløga fram um nakað annað, greiðir Uffe Bærentsen frá. Um ferðavinnan av álvara fer á rull, so ber hon seg sjálva, og Føroyar megna at hava eitt gott grundarlag undir eini nýggjari vinnu.

Nakrar týðiligar ábøtur kunnu gerast við eitt. Betri umstøður til húsvognar og tjalding og eisini fleiri klár tilboð til tey vitjandi. Matstovur, hotell, bussar, bátar, upplivingar og støð at vitja, eru longu í Føroyum, so tað er næstan klárt at taka ímóti einum streymi av ferðafólki, sigur Uffe Bærentsen.




*Peningurin, ið verður latin til ferðavinnuna er lítil í mun til aðrar vinnur í Føroyum. Við størri kapitali hevði tað latið seg gjørt, at økt inntøkuna í ein stóran mun.*